ÁRSFRÁGREIÐING 2023-2024

Innihald

1 Virksemið hjá MEGD 2023-2024 2

1.1 Starvsnevndin 2

1.2 Skrivstovan 2

1.2.1 Fylgjarakort 3

1.2.2 Parkeringskort 3

1.3 Fíggjarviðurskiftir 3

1.4 MEGD blaðið 2023: Børn og ung hava javnbjóðis rætt til eitt virðiligt lív 4

2 Brekrættindasáttmálin 5

2.1 Hagtøl og lýsing av brekøkinum 5

3 Formansfundir 6

4 Lógararbeiði 7

4.1 Ummælisskriv 7

5 Rættindi hjá fólki, ið bera brek, í almennum byggiverkætlanum 8

6 Rættindi og luttøka 8

6.1 Samskiftisdepil 8

6.2 Bústaðarviðurskifti 8

6.2.1 Viðkomandi keldur um grein 19, í altjóða brekrættindasáttmálanum, um „at liva sjálvstøðugt og verða tikin við í samfelagið". 9

6.3 Atkoma 9

6.3.1 matstovur 9

6.4 Tíðindaskriv 9

7 Yvirlýsing: Øll børn hava javnbjóðis rætt til eitt virðiligt lív 1

8 Ymiskt 10

Altjóða samstarv 10

Umboðan í Ráðum og nevndum í Føroyum 11

1 Virksemið hjá MEGD 2023-2024

1.1 Starvsnevndin

Í starvsnevndini hjá MEGD sita teir av aðalfundinum valdu limir: Forkvinnan og 4 limir, umframt 2 tiltakslimir. Hesi skulu vera úr ymiskum feløgum.

Starvsnevndarlimir og tiltakslimir verða valdir fyri tvey ár ísenn, og kunnu verða afturvaldir eina ferð.

Forkvinnan/maðurin verður vald/ur fyri trý ár í senn, og kann veljast aftur.Starvsnevndin skipar seg á fyrsta fundi eftir ársaðalfundin.

Øll viðkomandi mál verða viðgjørd í starvsnevndini, og hevur starvsnevndin ein fund um mánaðin, tó undantikið í juli. Aðalfundurin varð hildin 29. mars 2023 kl. 17:00 á Hotel Hilton.

Tey, ið hava mannað starvsnevndina síðan aðalfundin í 2023, eru:

Tóra við Keldu, forkvinna

Petur Elias Petersen, næstformaður

Katrin Jacobæus, nevndarlimur

Fía Petersen, nevndarlimur

Bjørg Dam, nevndarlimur

Sonja Tausen, tiltakslimur

John William Joensen, tiltakslimur

1.2 Skrivstovan

Tóra við Keldu er forkvinna í MEGD er at hitta á skrivstovuni týsdag, mikudag og hósdag.

Á skrivstovuni starvast Steindóra á Stongunum, skrivstovufólk, Gullbjørg Rasmussen, reingerðarfólk, Bárður Atlason Ísheim, aðalskrivari, og síðani 1. september hevur Dánjal Højgaard verið í verkætlanarstarvi sum løgfrøðiligur ráðgevi.

Virksemið á skrivstovuni snýr seg um umsiting av parkerings- og fylgjarakortum, móttøku av viðskiftafólki, telefonsamskifti, ráðgeving til limafeløg, feløg, almennar myndugleikar og privatpersónar.

MEGD fær ymiskar fyrispurningar frá privatfólki, stovnum og myndugleikum. MEGD tekur sær so vítt gjørligt ikki av einstaklingamálum uttan so, at tað hevur serligan almennan áhuga. Felags fatanin er tann, at limafeløgini eru betri før fyri at loysa einstaklingamál.

Heimasíðan

MEGD hevur eina virkna heimasíðu, sum er umráðandi sum samskifti úteftir. Harumframt hevur MEGD eisini eina virkna síðu á Facebook og Instagram.

Húsið

Fleiri av limafeløgunum nýta hølini í MEGD, og hevur nógv virksemið verið í húsinum, nú fleiri limafeløg skipa fyri sjálvhjálparbólkum. Somuleiðis er møguligt hjá øðrum at leiga hølini. Feløgini, sum hava skrivstovu í MEGD húsunum, eru: Sinnisbati, CP Føroyar, Gikta- , Diabetes-, Hjarta- og Psoriasisfelagið. Alzheimerfelagið og ADHD felagið hava hølir saman, og somuleiðis hava Heilafelagið og Parkinsonfelagið, Epilepsifelagið og Autismufelagið, og Hoyr og Hjartafelagið hava hølir saman.

Ábøtur á MEGD húsið hava snúð seg um samanlegging av hølunum hjá Sinnisbata, og hølunum hjá Parkinsonfelagnum og Heilafelagnum. MEGD og Blindafelagið/Sjóndepilin halda á fram við royndarverkætlanini at samstarva um at salta, tá kavi og frost er.

1.2.1 Fylgjarakort

Síðan skipanin varð sett í verk, hava 555 fólk, ið bera brek, fingið fylgjarakort. Í 2019 var avtalan um fylgjaraskipan við Smyril Line endurnýggjað, og í 2022 varð avtalan við Atlantic Airways endurnýggjað. Avtalan við Føroya Kommunufelag varð endurnýggjað í 2018.

1.2.2 Parkeringskort

Síðan skipanin við parkeringskort varð sett í gildi hava 732 fólk fingið parkeringskort. Fólk vendu sær til MEGD um møguleikan at fáa útflýggjað stovnskort, har stovnskortið er knýtt at akfari, sum hoyrir til stovnin. Við kunngerðini var tað ikki møguligt, tí eitt parkeringskort er persónligt. MEGD vendi sær til myndugleikan á økinum og 16. Februar 2021 kom nýggj kunngerð við ásetingum um stovnskort í gildi. Nú hava sambýlir fyri rørslutarnaði og bústovnar til eldri møguleika at søkja um stovnskort, har tað eru ein ella fleiri borgarar knýttir at stovninum, sum eru sera illa gongdir, hava varandi niðursett evni at virka ella onnur líknandi heilsulig viðurskifti, sum í stóran mun skerja evnini ella gera tað trupult at ferðast, og sum lúka krøvini um útgávu av parkeringskorti. 17 stovnar hava fingið stovnskort higartil.

1.3 Fíggjarviðurskiftir

Játtanin á fíggjarlógini til MEGD var økt í 2023 við kr. 300.000, og er hendan upphædd merkt til at styrkja grunnarnar hjá MEGD. Samlaða játtanin á fíggjarlógini til MEGD í 2023 var sostatt 1,95 mill.

Við støði í lóg um ítróttavedding fær MEGD tillutað 5% av veddingarpengunum. Upphæddin fyri 2023 var 714.000 kr. Veddingarpeningurin kemur limafeløgunum og MEGD til góðar.

Býtislykilin

Sambært viðtøkunum hjá MEGD, skal aðalfundurin taka støðu til býtið av fíggjarliga stuðlinum til limafeløgini. Aðalfundurin 2022 samtykti, at játtanin frá fíggjarlógini skal fara til MEGD og stuðulin frá Ítróttarvedding skal fara til limafeløgini. Hetta samsvarar betri við innihaldið í viðkomandi lógunum (Fíggjarlógini og lógini fyri Sp/f ítróttarvedding).

Uppskotið frá starvsnevndini um býtið av fíggjarliga stuðlinum frá Sp/f Ítróttarvedding var samtykt á aðalfundinum. Sostatt var stuðul býttur soleiðs: kr. 100.000 vóru settar í Limagrunnin, kr. 100.000 í Verkætlanargrunnin, og írestandi kr. 514.000 vóru býttar millum limafeløgini sambært býtislyklinum.

Limagrunnurin

Virksemið í limafeløgunum hevur verið stórt, og nógvar umsóknir vóru viðgjørdar og játtaðar í starvsnevndini í 2023. Starvsnevndin samtykti ymiskar broytingar í reglunum fyri Limagrunnin og Verkætlanargrunnin í 2023. Dagførdu reglurnar liggja tøkar á heimasíðuni. Framvegis er týdningarmikið at hava í huga, at feløgini kunnu søkja um stuðul úr verkætlanargrunninum, men at í november 2023 vóru eingir pengar eftir í Limagrunninum. Tað er sjálvandi gleðiligt, at Limagrunnurin verður nógv brúktur, men samstundis ein avbjóðing, at hann nú er tímur. Ætlanin er at fylla í aftur Limagrunnin á aðalfundinum í 2024.

Verkætlanargrunnurin

Fáar umsóknir vóru til verkætlanargrunnin hjá MEGD í 2023. Endamál grunsins er at stuðla verkætlanum, ið eru til gagns fyri eitt ella fleiri limafeløg hjá MEGD ella fyri meginfelagið. Verkætlanir, ið fáa stuðul úr hesum grunni skulu skipast í samsvari við endamálsorðinga hjá viðkomandi limafelagi, limafeløgum ella meginfelagi. Limafeløg eru sostatt vælkomin at søkja grunnin um stuðul, tá verkætlanir verða skipaðar.

1.4 MEGD blaðið 2023: Børn og ung hava javnbjóðis rætt til eitt virðiligt lív

MEGD blaðið kom út áðrenn altjóða dagin hjá teimum, ið bera brek, sum árliga er 3. desember. Blaðið viðgjørdi støðuna hjá børnum og ungum, sum varð lýst út frá ymiskum sjónarhornum. Blaðið fæst við at venda sær til skrivstovuna, ella við at vitja heimasíðu okkara undir SAVN.

2 Brekrættindasáttmálin

MEGD arbeiðir miðvíst við at eygleiða, umrøða og minna viðkomandi partar á niðurstøðurnar hjá nevndini undir Brekrættindasáttmálanum hjá ST. Endamálið er at ávirka viðkomandi partar, serliga almenna myndugleikan, at arbeiða miðvíst við at gera neyðugar broytingar og tillagingar, fyri soleiðis at tryggja menniskjarættindi hjá fólki, ið bera brek í Føroyum.

Mannarættindaeind / Talsfólk á brekøkinum / Brekrættindaumboð

Við støði í altjóða brekrættindasáttmálanum grein 33, og niðurstøðunum hjá nevndini undir nevnda sáttmála, hevur MEGD í fleiri ár víst á, at Føroyar hevur einki óheft eftirlit á brekøkinum, ið hevur til endamáls at virka fyri at menniskjarættindi verða vard. Málið varð í 2021 viðgjørt í Uttanríkisráðnum og politisk avgerð var tá tikin um, at tað var landsstýriskvinnan í almannamálum, sum skal taka sær av málinum at seta í verk eftirlitsskipan sambært grein 33 til borgarar, ið bera brek v.m..

Grundgevingin fyri, at grein verður staðsett í Almannamálaráðnum er, at Almannamálaráðið hevur nógv tey flestu málini viðvíkjandi fólki, ið bera brek, og tí hevur tað hildið verið natúrligt, at Almannamálaráðið tekur sær av málum, viðvíkjandi teimum, ið bera brek, sum ikki hoyra til einstaka geiran ella sum eru tvørgangandi. Nýggja samgongan hevur valt at fylgja sama leisti. MEGD ynskir, at eftirlitið fer at virka tvørtur um geirar, og at arbeitt verður við at hetta liggur saman við øðrum lógareftirliti, eitt nú undir Løgmansskrivstovuni ella undir Uttanríkistænastuni.

Í mai mánað 2023 var uppskot til lóg um Brekumboð sent til hoyringar, og MEGD sendi hoyringarskriv inn í juni. Eisini sendu limafeløg og aðrir partar hoyringarskriv inn, og uppskotið var í desember 2023 sent til Løgtingið at umrøða og viðgera.

Samskipandi eind og brekpolitisk virkisætlan

Striltið hevur gingið at fáa samskipandi eindina sambært brekrættindasáttmálanum at virka. MEGD fegnaðist á vári 2019, tá *samskipandi eindin* varð sett. Longu í 2020 var nýggj nevnd vald, og í 2021 var umskipan og útskifti av umboðum av nevndini í Almannamálaráðnum.

Eins og við undanfarnum samgonguskjølum, hevur verandi samgonga aftur ætlanir um at gera eina yvirskipaða brekpolitiska virkisætlan.

2.1 Hagtøl og lýsing av brekøkinum

Sambært grein 31 í altjóða brekrættindasáttmálanum skulu limalondini átaka sær at savna hóskandi upplýsingar, eisini hagtals- og granskingartilfar, sum ger tey før fyri at orða og seta í gildi reglur, ið seta sáttmálan í verk. MEGD hevur áhaldandi víst á, at í Føroyum mangla vit at hagtøl verða gjørd, og at tey verða skipað og gjørd alment tøk eitt nú í mun til lógarsmíð og fyri umboðandi feløg innan brekøkið. Hagtøl eru grundarlag undir gransking og geva eina yvirlitsmynd av viðkomandi rættindum, sum kann nýtast eitt nú í lógarsmíði og í arbeiðinum, sum heild, fyri betri korum á brekøkinum.

Týdningarmikið er tí frá almennari síðu at gera neyðugar fyriskipanir, sum samla inn hagtøl eftir altjóða hagtalsstandardum, at hagtølini verða greinað og løgd fram fyri almenninginum og feløgum, soleiðis at tey kunnu gagnnýtast, tá tað er neyðugt. Hugvekjandi varð at hoyra um álvarsomu hagtalskanningina í Danmark, ið prógvaði at óneyðuga nógv bein vórðu blivin amputerað á ávísum sjúkrahúsi í Danmark. Á slíkan hátt kunnu hagtalskanningar tryggja mannrættindi ella prógva mannarættindabrot. Granskingarverkætlanin hjá MEGD um trivnað hjá fyritíðarpensjónistum er seinkað nakað, og verður eftir ætlan liðug í 2024.

3 Formansfundir

Mikudagin 3. mai var formansfundur hildin, har evnið var at umrøða stóru avbjóðingarnar í vælferðarsamfelagnum, og hvussu hesar eiga at verða loystar saman við áhugafeløgum hjá fólki, ið bera brek, og hvussu vit gera fyri at finna loysnir, ið samsvara við rættindi og áhugamál hjá limum í limafeløgunum. Tískil var eisini umrøtt, hvussu grunnarnir hjá MEGD kunnu gagnnýtast til átøk og verkætlanir hjá limafeløgum, og um tað var tørvur og áhugi í at skipa fyri samstarvi millum tvey ella fleiri feløg.

Týsdagin 13. juni hevði løgtingsforkvinnan, Bjørt Samuelsen, bjóðað limafeløgunum í MEGD at koma á vitjan í Løgtinginum. Endamálið við vitjanini var at greiða frá Løgtinginum og arbeiðinum hjá teimum, og samstundis at hoyra áskoðanina hjá limafeløgunum um atkomu í Løgtinginum í breiðari merking, bæði í mun til at kunna koma í tingið og at kunna fylgja við í politiska arbeiðinum. Hesar umstøður eru eitt mál, sum løgtingsforkvinnan ynskir at gera alt fyri at bøta um í tann mun, at hetta ber til.

Mánadagin 11. september kl. 16:30 vóru Hallur Thomsen, depilstjóri á Almannaverkinum, og Miriam Hentze Johannesen, deildarleiðari innan samskiftismenning, á gátt í MEGD húsinum og greiddu nærri frá ætlanunum hjá Almannaverkinum at seta á stovn eina nýggja eind, sum verður nevnd ”Samskiftismenning”. Høvið var at seta spurningar, viðmerkja og geva íkast.

4 Lógararbeiði

4.1 Ummælisskriv

MEGD fegnast um at fáa lógaruppskot, kunngerðir o.a. til hoyringar. Alt hoyringartilfar verður sent víðari til limafeløgini, sum fáa møguleika at viðmerkja. MEGD sendir ummælisskriv til øll uppskot, sum verða send felagnum. Í 2023 sendi MEGD hoyringarskriv í sambandi við fylgjandi lógir, ríkislógartilmæli, kunngerðir, frágreiðing, vegleiðing o.a.:

- Uppskot til nýggja ílegulóg (2. hoyring)
- Uppskot um at avmarkað ókeypis sálarlig viðgerð til einans at fevna fólki millum 15-25 ár
- Uppskot til broyting í lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk (útbúgvingarstuðul)
- Uppskot um broyting í lóg um almannatrygd- og tænastur (stuðul til bil)
- Uppskot um broyting í lóg um heilsutrygd
- Kunngerð um endurgjald fyri inntøkumiss
- Uppskot til nýggja ílegulóg
- Broyting í revsilógini (kap 1-11)
- Ásetingar um arbeiðið hjá viðgerðarfarmaceutum
- Uppskot til kunngerð um krabbameinsskrá o.a. í Føroyum
- Brekumboð
- Heildarætlan fyri harðskap í parløgum og nærsambondum
- Talgilt samleikakort
- Løgtingslóg um Mínboks
- Skyldurnar hjá privatum viðgerðarstøðum
- Rásin útbyggjast
- Broytingar í Psykiatrilógini
- Renturokningin av endurgjaldskrøvum broytist

Øll hoyringarskrivini liggja á heimasíðuni, www.megd.fo.

5 Rættindi hjá fólki, ið bera brek, í almennum byggiverkætlanum

Í sambandi við at landsstýrið hevur ætlanir um at seta gongd á fleiri byggiverkætlanir innan brekøkið í komandi árini, hava fleiri limafeløg í MEGD tikið seg saman í ein arbeiðsbólk. Endamálið við arbeiðsbólkinum er fremja áhugamálini hjá feløgunum, og at verða væl og virðiliga umboðað í nýggju byggiverkætlanum í komandi árini.

Mett verður, at tað bæði í mun til hvørt einstakt felag og felags, er tað ein greiður fyrimunur, um limafeløgini eru væl fyrireikað, og hava eina greiða skipan fyri, hvussu limafeløgini á bestan hátt kunnu tryggja, at byggiverkætlanirnar áhaldandi hava rættindi og menniskjað í miðdeplinum. Arbeiðsbólkurin hittist nakrar ferðir í 2023, og viðgjørdi viðkomandi viðurskifti innan bygging.

Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almannamálum, sendi innbjóðing til hendan bólkin at velja eitt umboð í ein nýggjan arbeiðsbólk hjá landsstýrinum, ið hevði til endamáls at gera eina tørvslýsing av nýggjari byggiverkætlan í Vágunum, har eitt nýtt sambýli skal byggjast til fólk við sálarligum avbjóðingum. Vegna limafeløgini luttók aðalskrivarin hjá MEGD í arbeiðsbólkinum hjá landsstýrinum, sum beint áðrenn jól lat landsstýiskvinnuni eitt tilmæli.

6 Rættindi og luttøka

6.1 Samskiftisdepil

MEGD hevur í fleiri umførum víst á, at tað vanta tilboð til fólk, sum hava tørv á stuðul at samskifta. MEGD hevur mælt til, at ein samskiftisdepil verður settur á stovn í Føroyum, har einhvør kann venda sær við samskiftisspurningum, óansæð um talan er um sjón, hoyrn, talu, rødd, kognitión, at lesa og stava, tøknilig hjálpartól ella annað. Ein samskiftisdepil hevur vanliga tilboð um útgreinan, ráðgeving, undirvísing og at veita hjálpartól innan samskifti, men eigur eisini at taka atlit til menning. Í september 2023 setti Almannaverkið í verk eina nýggja eind, sum verður nevnd ”Samskiftismenning”, og formansfundurin hjá MEGD hin 11. september viðgjørdi hetta evnið.

6.2 Bústaðarviðurskifti

Sum støðan er nú, mugu fólk, ið bera brek, bíða sera leingi eftir at fáa egið heim. Hetta ávirkar trivnað og lívsgóðsku, bæði hjá teimum og avvarðandi teirra. Tískil má ferð fáast á at byggja heim og bústaðir innan brekøkið. Nýggja sambýlið á Mýruni í Hoyvík var liðugt í 2023, og heimið til børn við autismu í Kvíggjartúni á Argjum lat eisini upp. Hetta fegnast MEGD um, umframt at breið semja er í samfelagnum um, at víðari neyðug stig mugu takast sum skjótast.

MEGD ger áhaldandi vart við, at atlit eiga at verða tikin til, at nýggir bústaðir vera hugnaligir og heimligir, og at trivnaður og lívsgóðska hjá fólki, ið bera brek, áhaldandi verður í miðdeplinum, tá bygt verður. Vit mugu í felag virka fyri at byggja *heim* og ikki stovnar. Royndir og gransking vísa, at stovnsgerð (*institutionalisering*), kann avmarkað trivnað bæði hjá húsfólki og starvsfólkum, og tí er neyðugt at tryggja, at tað ikki verður bygt ov stórt. Gransking úr Noregi og Svørríki vísur, at fólk trívast best í smáum

bústøðum/felagsskapum/eindum, og MEGD hevur enn onga gransking sæð, ið gevur ábendingar um, hvussu starvsfólk ella húsfólk trívast í størri eindum.

6.2.1 Viðkomandi keldur um grein 19, í altjóða brekrættindasáttmálanum, um „at liva sjálvstøðugt og verða tikin við í samfelagið".

- UNCRPD General comment No.5 on Article 19: The Right to Live Independently and be Included in The Community. (Sí skjal CRPD/C/GC/5)
- UN Guidelines on Deinstitutionalization, Including in Emergencies. (Sí skjal CRPD/C/5)
- EU Guidance on Independent Living and Inclusion In The Community (Sí skjal HER)
- Inclusion International: *Inclusive Communities = Stronger Communities: A Global Report on Article 19* (Sí skjal HER)
- Utviklingshemmetes bosituasjon 2021. (Sí skjal HER)
- Store bofellesskap for personer med utviklingshemming: Noen konsekvenser. 2011. NTNU, Samfunnsforskning. (Sí skjal HER)
- www.emrahus.se
- Grein hjá MEGD um fyrimunirnir við smærri eindum: Smátt er gott.

6.3 Atkoma

6.3.1 matstovur

Í samband við átakið á sumri 2019 um atkomuligar matstovur í Føroyum, fekk MEGD í 2021 gjørt ein lykil frá Mikkalina glas, sum var útborin til tær 18 atkomuligu matstovurnar, sum fingu viðurkenningina fyri góða atkomu. Í 2023 fekk eingin nýggj matstova MEGD lykilin.

6.4 Tíðindaskriv

MEGD skrivaði í 2023 fleiri greinar, ið viðgjørdi ymisk viðkomandi evni um rættindi hjá fólki, ið bera brek. Allar greinarnar liggja á heimasíðuni hjá MEGD, og hesar vóru:

- Verjið fíggjarligu rættindi teirra, ið bera brek
- Krepputilbúgvingin skal verja øll
- Talgild inklusjón - hvussu tryggja vit øllum møguleikan at verða við?
- Farið aftur til samráðingarborðið
- Norðurlendskur fundur um íverksetan av brekrættindasáttmálanum
- Arbeiðsmarknaðurin skal gerast meira fevnandi
- Uttan umboðan eru rættindi skerd
- Hoyringar fremja dygd og góðsku
- Skjót hjálp er dupult hjálp
- Dánjal er løgfrøðiligur ráðgevi
- Eitt lív uttan rødd er einki lív
- Smátt er gott
- Javnvág við vitan og vísdómi
- Umbering frá donsku stjórnini
- Eftir tørvi skal lóg lagast
- Tryggja brekrættindi í verki
- Talgild atkoma og grøna skiftið
- Yvirlýsing - Øll børn og ung hava javnbjóðis rætt til eitt virðiligt lív
- Persónliga rættartrygdin í vanda
- Rættindaverja og virðilig vælferð
- Hoyringar hava týdning
- Verjir psykiatrilógin veruliga?
- Einki um okkum uttan okkum

- Samstarv styrkir skipanir

7 Yvirlýsing: Øll børn hava javnbjóðis rætt til eitt virðiligt lív

Í mars mánað sendu MEGD og øll 24 limafeløgini út eina yvirlýsing í felag, ið hevði til endamáls at gera vart við, at rættindi hjá børnum og ungum, ið bera brek, eiga at verða raðfest hægri.

YVIRLÝSING

ØLL BØRN OG UNG HAVA JAVNBJÓÐIS RÆTT TIL EITT VIRÐILIGT LÍV

Vit, ið umboða áhugamálini hjá føroyskum børnum og ungum, ið bera brek, vilja hervið gera vart við, at tað eru viðurskifti og umstøður í Føroyum, ið beinleiðis og áhaldandi føra við sær, at rættindi hjá fleiri børnum og ungum, ið bera brek, ikki verða virð.

Sambært altjóða Brekrættindasáttmálanum eiga umstøður og karmar at verða tillagað, soleiðis at øll okkara børn og ungu, ið bera brek, fáa somu virðing, sum onnur børn. Hóast hetta, so eru vit vitni til, at mismunur verður framdur í verki. Vit síggja, at føroyskar lógir og kunngerðir ikki hava neyðugar og ítøkiligar orðingar, ið kunnu tryggja rættindini hjá okkara børnum.

Harumframt síggja vit manglandi samstarv ímillum myndugleikar og viðkomandi partar, at tænastur eru misjavnar alt eftir, hvar í landinum ein býr, og at mismunur verður gjørdur á børnum og ungum, ið hava sama tørv á hjálp. Avleiðingarnar fyri hesi børn og ungu, og familjur teirra, eru í mongum førum álvarsamar.

Vit vilja tí staðiliga heita á viðkomandi myndugleikar og partar til skjótast gjørligt at fáa burtur allan mismun vegna brek. Lógarverkið má styrkjast, og tænastur sameinast, soleiðis at øll børn og ung, ið bera brek, fáa møguleika at mennast, luttaka og trívast, eins og onnur børn.

Tað ber ikki til at gera góðar loysnir uttan veruliga at hoyra og skilja støðurnar hjá okkara børnum og ungu, umframt at vit eisini síggja somu avbjóðingar bæði millum vaksin og eldri. Tí bjóða vit okkum fram sum ráðgevar og viðleikarar hjá myndugleikum og pørtum, ið arbeiða við at finna loysnir.

MEGD og limafeløgini

ADHD felagið	Føroya Deyvafelag	Stoffskiftisfelagið
Alzheimerfelagið	Diabetesfelagið	Føroya Psoriasisfelag
Autismufelagið	Epilepsifelag Føroya	Giktafelag Føroya
Colitis-Crohn Føroyar	Felagið fyri lesi- og skriviveik	Heilafelagið
CP Føroyar	Føroya Astma/Allergifelag	Hjartafelagið
Cøliakifelag Føroya	Føroya Blindafelag	HOYR
Sinnisbati	Sclerosufelagið	Javni
Parkinsonfelagið	Parasport Føroyar	Nýrafelagið

8 Ymiskt

Altjóða samstarv

Handikapporganisasjonenes Nordiske Råd (HNR)

Noregi fekk formansskapin í HNR (Handikaporganisationernes Nordiske Råd) í 2021, og í 2023 varð formansskapin fluttir til Svørríki. Tey, ið sita sum umboð fyri tey Norðurlendsku meginfeløgini eru formenn/kvinnur og aðalskrivarar í meginfeløgunum. Fundir vera hildnir hálvárliga, og í 2023 var fyrsti fundurin í mars, forkvinna og aðalskrivari hjá MEGD luttóku, og seinni fundurin var í oktober í Keypmannahavn.

Avbjóðingar eru innan krepputilbúgvingarnar í norðurlondum, og tí sendi HNR út eina felags grein í oktober 2023, ið gjørdi vart við, at krepputilbúgvingarnar eiga at verja øll, og at rættindi hjá fólki, ið bera brek, áhaldandi verða skerd í kreppum og í brádliga íkomnum broytingum. Nýggjastu royndirnar við alheimsfarsótt, flóttafólkasteymi og alsamt hækkandi prísum vísa júst hetta. Við felags skrivinum mælti HNR Norðurlendska ministararáðnum til at minna norðurlendsku stjórnirnar á tey rættindi, fólk, ið bera brek, hava, tá ið kreppur raka og at tilbúgvingin eigur at verja øll.

Á fundinum í oktober var evnið *íverksetan av brekrættindasáttmálanum* og hvussu londini hvør í sínum lagi arbeiða við at hava eftirlit við íverksetanini av sáttmálanum, og hvussu gongst við at dagføra og tillaga galdandi lóggávu í londunum, soleiðis at hon er á altjóða støði. Hetta týðandi evnið fyllir nógv hjá øllum londunum, og tað var gevandi at umrøða avbjóðingar og møguligar loysnir.

Rådet för Nordiskt samarbejde hevur verið virkið síðan 2013. Tóra við Keldu, forkvinna, umboðar MEGD í ráðnum, og Bárður Atlason Ísheim, aðalskrivari, er tiltakslimur.

Í døgunum 30. - 31. mai var MEGD á fundi í norðurlendska ráðnum, Rådet för nordiskt samarbete om funktionshinder, sum liggur undir norðurlendska ráðharraráðnum. Hesaferð var fundurin í Reykjavík, og yvirskipaða evnið var talgild atkoma og talgildir møguleikar í mun til fólk, ið bera brek. MEGD luttók eisini á ráðstevuni *Nordic Welfare Forum*, sum varð hildin í Reykjavík fyrst í juni.

Í døgunum 19. og 20. oktober var MEGD við á norðurlendskum fundi í norðurlendska brekráðnum, Rådet för nordiskt samarbete om funktionshinder, og hesa ferð í Keypmannahavn. Ráðið liggur undir norðurlendska minisararáðnum og er sett við tveimum umboðum fyri hvørt norðurland, eitt frá almenna myndugleikanum og eitt frá meginfeløgunum. Frá Almanna- og mentamálaráðnum er Barbara Álvsdóttir Thomsen umboð. Har varð tosað um, hvussu norðurlond kunnu samstarva til frama fyri brekøkið. MEGD takkar hesaferð Herdis Johnsdóttir Johannesen frá *Spyr meg* fyri hennara góðu umboðan sum ungdómur hesar dagarnar. Takk fyri tín leiklut, Herdis!

European Disability Forum (EDF)

European Disability Forum er evropeiska meginfelagið fyri fólk, ið brek, og virkar til dagligt fyri at verja áhugamálini hjá yvir 100 milliónum fólkum, ið bera brek. Eins og MEGD, er European Disability Forum óheft átrúnaðarliga og politiskt, og arbeiðir á tí grundarlagi við at byggja brýr millum feløg innan brekøkið í Evropa.

European Disability Forum hevur eisini tætt samstarv við Sameindu Tjóðir (ST) innan mál og viðurskifti, ið hava týdning fyri fólk, ið bera brek.

MEGD fekk atlimaskap í European Disability Forum í 2022, og luttók á aðalfundinum hjá EDF í Brússel í mai 2023.

Fyri fyrstu ferð luttók MEGD á Evropatinginum fyri fólk, ið bera brek, *The 5th European Parliament of Persons with Disabilities*, ið varð hildið í Evropatinginum í Brússel. Hendan dagin var stóri tingsalurin, ið er formaður sum ein hálvringur, fullsettur av fólki. Allir 724 luttakararnir høvdu tað til felags, at hesir á ymiskan hátt arbeiða fyri at fremja í verki rættindi teirra, ið bera brek.

Umboðan í Ráðum og nevndum í Føroyum

Dugni

Tóra við Keldu umboðar MEGD í ráðnum fyri Dugna.

Ráðið fyri ferðslutrygd

Tóra við Keldu umboðar MEGD í Ráðnum fyri ferðslutrygd.

Javnstøðunevndin

Í samband við kærur um mismun á arbeiðsmarknaðinum skal MEGD hava umboð í arbeiðinum at viðgera kærur sambært lóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum. Bárður Atlason Ísheim, aðalskrivari, umboðar MEGD í nevndini og Tóra við Keldu, forkvinna, er varaumboð.

Psykiatriska sjúklingakærunevndin

Nýggir limir vóru valdir í nevndina í 2021, og fyri MEGD var Oda Jóhansdóttir skotin upp sum limur og Vivian Sjóðklett sum varalimur at taka sæti í nevndini.

Sjúklingaráðið

Bygnaðurin í Sjúklingaráðnum varð broyttur í 2022, og limatalið varð harvið minkað frá nýggju til fimm limir, og ásett meira greitt, hvørjar uppgávur og skyldur Sjúklingaráðið hevur. MEGD sendi hoyringarskriv 14. januar 2022. Í juli mánað skipaði MEGD fyri atkvøðugreiðslu á netinum ímillum umboð hjá limafeløgunum í sambandi við valið til Sjúklingaráðið. Vegna limafelgini sendi MEGD 6 ymisk

uppskot, og 4 av teimum vórðu vald. Heili 4 út av 5 limum í nýggja Sjúklingaráðnum eru sostatt umboð úr limafeløgunum hjá MEGD. Hesi eru:

- Poula Reinert Olsen (CP Føroyar), Nes, næstforkvinna.
- Hilmar Augustinussen (Alzheimerfelagið), Tórshavn, skrivari.
- Emil Michelsen (Heilafelagið), Øravík.
- Hergerð Joensen (Giktafelagið), Miðvágur

07/02/2024/Bárður Atlason Ísheim, aðalskrivari